# Løgmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 18.12.2023 |
| Mál nr.: | 23/23990 |
| Málsviðgjørt: | JAK |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)**
(Rætta tilvísingar og strika kravið um navnloysi og ókenniligheit í sambandi við almannakunngering av avgerðum hjá Dátueftirlitinum)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin) verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 3, stk. 3 og 4 verður "§§ 41, 42 og 47" broytt til: "§§ 41, 42 og 46".

**2.** § 73, 2. pkt. verður orðað soleiðis: "Í avgerðum, sum Dátueftirlitið almannakunnger, skulu einstaklingar ikki verða nevndir við sínum navni."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

*§ 1, nr. 1: Rætting av tilvísingum*

Í § 3, stk. 3 og 4 verður í dag víst til § 47 í løgtingslógini. Hetta er ein feilur. Ásetingarnar eiga av røttum at vísa til § 46 í løgtingslógini, og við uppskotinum verður hetta rættað.

*§ 1, nr. 2: Strika kravið um ókenniligheit og navnloysi bara galdandi fyri einstaklingar*

Dátueftirlitið kann, sambært § 73, 1. pkt. í dátuverndarlógini, almannakunngera síni úttalilsir og sínar avgerðir.

Í serligu viðmerkingunum til ásetingina verður greitt frá um endamálið við almannakunngering:

"At Dátueftirlitið almannakunngerð úttalilsir og avgerðir hevur ómetaliga stóran týdning fyri dátuábyrgdarar og dátuviðgerar, sum skulu halda løgtingslógina. Tað verður sostatt eitt týdningarmikið amboð fyri tey, sum eru fevnd av lógini, og sum hava ábyrgdina av, at løgtingslógin verður hildin, at tey kunnu kunna seg um, hvør siðvenjan hjá Dátueftirlitinum er, og hvørjar tulkingar av løgtingslógini verða lagdar til grund í bæði ítøkiligum og almennum málum."

Almannakunngering verður sostatt mett at hava stóran týdning fyri menningina av dátuverndarøkinum í Føroyum.

Samstundis sum § 73, 1. pkt. heimilar Dátueftirlitinum at almannakunngera sínar avgerðir, setur § 73, 2. pkt. sum krav, at avgerðirnar, ið verða kunngjørdar, skulu vera navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt.

Dátueftirlitið hevur á sumri 2023 gjørt landsstýrismanninum og Løgmálaráðnum greitt, at kravið í § 73, 2. pkt. um navnloysi og ókenniligheit hevur við sær, at Dátueftirlitið illa fær útint uppgávuna við at almannakunngera avgerðir, og at nyttuvirðið í at almannakunngera undir øllum umstøðum er avmarkað. Orsøkin til hetta er, at Dátueftirlitið, fyri at lúka ásetingina í § 73, 2. pkt., í nógvum má strika upplýsingar úr avgerðini, sum hava havt týdning fyri niðurstøðuna í málinum. Hetta ger tað trupult hjá lesaranum at skilja, júst hvat tað er, ið er farið fram í einum máli. Í tílíkum førum er tað ivasamt, um lesarin – tað veri seg t.d. ein dátuábyrgdari, dátuviðgeri ella ein skrásettur – kann fáa nakað burturúr almannakunngjørdu avgerðini.

Í einstøkum førum er tað komið fyri, at tað ikki hevur borið til hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera eina týðandi avgerð, tí § 73, 2. pkt. hevur havt við sær, at tað ikki hevur verið møguligt at greiða frá málinum á nøktandi hátt. Yvirhøvur er tað trupult hjá Dátueftirlitinum at greiða frá einum máli, har t.d. ein stór føroysk fyritøka partur, uttan at tað samstundis er rættiliga greitt, hvørja fyritøku ella stovn málið snýr seg um.

Henda rættarstøða er ikki nøktandi, tí hon forðar Dátueftirlitinum í at kunna útinna eina av sínum kjarnuuppgávum, ið sum nevnt verður mett at hava stóran týdning fyri menningina av dátuverndarøkinum í Føroyum.

Fyri at tryggja, at Dátueftirlitið hevur møguleika at almannakunngera allar viðkomandi avgerðir, verður tí skotið upp at strika kravið um ókenniligheit í § 73, 2. pkt. Samstundis verður skotið upp at avmarka kravið um navnloysi, soleiðis at tað frameftir bara fer at fevna um einstaklingar – og ikki um feløg, fyritøkur, almennar myndugleikar og kommunur o.a.

Henda broyting fer at gera tað munandi lættari hjá Dátueftirlitinum at greiða frá einum máli, hvat niðurstøðan í málinum er grundað á, og harvið eisini hvussu løgtingslógin eigur at verða tulkað í ymiskum samanhangum.

Við broytingini verður Dátueftirlitið eisini javnsett við aðrar føroyskar eftirlitsmyndugleikar og stovnar sum t.d. Kappingareftirlitið, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann, sum allir hava møguleika at almannakunngera sínar avgerðir, uttan at tær skulu vera gjørdar navnleysar og ókenniligar áðrenn.

Dátueftirlitið verður eisini javnsett við dátueftirlitini í grannalondum okkara, sum flest øll hava henda møguleika, og sum Dátueftirlitið hevur eitt gott og tætt samstarv við.

Mett verður harafturat, at broytingin fer at hava við sær ein uppalandi og harvið eisini fyribyrgjandi virknað, tí eingin fyritøka ella stovnur hevur ynski um at enda á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, tí fyritøkan ella stovnurin ikki hevur hildið sínar skyldur sambært dátuverndarlógini. Møguleikin fyri at verða settur í ringt ljós fer sostatt at virka sum ein tileggjan til at halda løgtingslógina, og til at akta boð frá Dátueftirlitinum – serliga fyri almennar myndugleikar, sum ikki kunnu revsast fyri brot á dátuverndarlógina á sama hátt sum privat.

Í viðmerkingunum til § 73, 2. pkt. í uppskotinum frá 2020 verður víst á, at endamálið við almannakunngering ikki er, at "..ávísar fyritøkur ella stovnar skulu heingjast út, men at tað verður lættari hjá dátuábyrgdarum o.ø. at fylgja lógini í samsvari við siðvenju hjá Dátueftirlitinum."

Tað var sostatt atlitið at t.d. fyritøkum og almennum stovnum, ið var avgerandi fyri, at ásetingin í § 73, 2. pkt. endaði við at verða tikin við í løgtingslógina.

Í dag ásannar Løgmálaráðið, at ásetingin er óheppin, tí dátuverndarlógin eigur ikki at verja stovnar og fyritøkur, sum ikki halda løgtingslógina, og sum í summum førum enntá ganga beinleiðis ímóti boðum frá Dátueftirlitinum. Hetta er tí eisini í sær sjálvum ein orsøk til ætlaðu broytingina.

§ 36 í dátuverndarlógini avmarkar m.a. kunningarskylduna og rættin hjá tí skrásetta til innlit, tá ið tað ítøkiliga verður mett, at um upplýsingarnar koma í ljósmála, kann tað skaða t.d. landsins trygd og verju ella samskifti við útlendskar tjóðir. Sambært § 73, 3. pkt. í dátuverndarlógini skal ásetingin nýtast samsvarandi fyri almannakunngering. § 73, 3. pkt. kann tí eisini avmarka møguleikarnar hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera eina avgerðir, ella partar av eini avgerð, og hetta verður ikki broytt við uppskotinum.

**1.2. Galdandi lóggáva**
Í § 3, stk. 3 og 4 verður í dag víst til m.a. § 47 í løgtingslógini.

§ 73, 2. pkt. ásetur í dag, at avgerðir, fyri at kunna verða almannakunngjørdar, skulu vera navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið við broytingini í § 1, nr. 1 er at rætta tvær skeivar tilvísingar í ásetingunum í § 3, stk. 3 og 4 í dátuverndarlógini. Hesar ásetingar vísa í dag til § 47 í dátuverndarlógini, men eiga av røttum at vísa til § 46. Hetta verður tí broytt.

Endamálið við broytingini í § 1, nr. 2 er at gera tað møguligt hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera sínar avgerðir, uttan at tær skulu vera gjørdar navnleysar og so ókenniligar sum gjørligt. Kravið um navnloysi verður tó framvegis galdandi fyri einstaklingar.

Yvirskipaða endamálið við broytingini er at tryggja framhaldandi menning av dátuverndarøkinum í Føroyum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Í galdandi § 3, stk. 3 og 4 í verður víst til § 47 í løgtingslógini. Hetta er ein feilur. Ásetingarnar eiga av røttum at vísa til § 46 í løgtingslógini, og við uppskotinum verður hetta rættað.

Uppskotið leggur harafturat upp til at strika treytina í § 73, 2. pkt. um, at tá ið Dátueftirlitið almannakunnger sínar avgerðir, skulu avgerðirnar vera navnleysar og gjørdar so ókenniligar sum gjørligt. Við uppskotinum fer Dátueftirlitið sostatt at fáa møguleika til at almannakunngera sínar avgerðir, uttan at tær skulu vera gjørdar navnleysar og so ókenniligar sum gjørligt. Kravið um navnloysi verður tó framvegis galdandi fyri einstaklingar.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur í tíðarskeiðinum desember-januar verið til ummælis hjá hesum pørtum:

Uppskotið hevur harafturat í sama tíðarskeiðið ligið alment til ummælis á hoyringarportalinum hjá Føroya landsstýri.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið fer at gera tað munandi lættari hjá Dátueftirlitinum at kunngera sínar avgerðir, sum frameftir fer at kunna almannakunngera sínar avgerðir, uttan at tær skulu vera gjørdar navnleysar og so ókenniligar sum gjørligt.

Kravið um navnloysi verður varðveitt fyri einstaklingar, men hetta fer ikki hava ávirkan á møguleikarnar hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera avgerðir.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Við broytingini í § 1, nr. 2 fer Dátueftirlitið frameftir at kunna almannakunngera eina avgerð, uttan at avgerðin skal vera gjørd navnleys og so ókennilig sum gjørligt. Hetta kann hava við sær negativar avleiðingar fyri eina fyritøku, sum ikki hevur hildið sínar skyldur sambært dátuverndarlógini, tí almenningurin fer, í størri mun enn í dag, at fáa kunnleika til hesi viðurskifti.

Mett verður tó, at hetta er eitt neyðugt amboð hjá Dátueftirlitinum til at menna dátuverndarøkið í Føroyum.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar avleiðingar fyri nakað serstakt øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki serligar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Mett verður ikki, at lógaruppskotið er viðkomandi fyri nakran millumtjóðasáttmála, sum Føroyar hava skyldu til at fylgja.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at uppskotið er í samsvari við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan og ST-sáttmálan um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ongar nýggjar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir.

Við broytingini í § 1, nr. 2 fer Dátueftirlitið frameftir at kunna almannakunngera eina avgerð, uttan at avgerðin skal vera gjørd navnleys og so ókennilig sum gjørligt. Hetta kann hava við sær negativar avleiðingar fyri eina fyritøku, sum ikki hevur hildið sínar skyldur sambært dátuverndarlógini, tí almenningurin fer, í størri mun enn í dag, at fáa kunnleika til hesi viðurskifti.

Mett verður tó, at hetta er eitt neyðugt amboð hjá Dátueftirlitinum til at menna dátuverndarøkið í Føroyum.

Kravið um navnloysi verður framvegis galdandi fyri einstaklingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum nakrar skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Við broytingini í § 1, nr. 2 fer Dátueftirlitið frameftir at kunna almannakunngera eina avgerð, uttan at avgerðin skal vera gjørd navnleys og so ókennilig sum gjørligt. Hetta kann hava við sær negativar avleiðingar fyri eina fyritøku, sum ikki hevur hildið sínar skyldur sambært dátuverndarlógini, tí almenningurin fer, í størri mun enn í dag, at fáa kunnleika til hesi viðurskifti.

Mett verður tó, at hetta er eitt neyðugt amboð hjá Dátueftirlitinum til at menna dátuverndarøkið í Føroyum.

Kravið um navnloysi verður framvegis galdandi fyri einstaklingar.

## 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Í galdandi § 3, stk. 3 og 4 í verður víst til § 47 í løgtingslógini. Hetta er ein feilur. Ásetingarnar eiga av røttum at vísa til § 46 í løgtingslógini, og við uppskotinum verður hetta rættað.

**Til § 1, nr. 2**
Dátueftirlitið hevur í dag, sambært § 73, 1. pkt. í dátuverndarlógini, heimild til at almannakunngera sínar avgerðir. Avgerðir, sum verða kunngjørdar, skulu tó, sambært § 73, 2. pkt., vera navnleysar og skulu harafturat vera gjørdar so ókenniligar sum gjørligt.

Við uppskotinum verður kravið um ókenniligheit strikað. Samstundis verður kravið um navnloysi avmarkað, soleiðis at tað frameftir bara verður galdandi fyri navnið á einstaklingum.

Hetta verður gjørt við at broyta orðingina av § 73, 2. pkt. til tað fylgjandi:

"Í avgerðum, sum Dátueftirlitið almannakunnger, skulu einstaklingar ikki verða nevndir við sínum navni."

*Einstaklingur* skal skiljast sum ein og hvør likamligur persónur. Kravið um navnloysi fer sostatt at fevna um privatpersónar, men eisini um almennar og privatar stjórar.

At kravið um navnloysi bara verður galdandi fyri navnið á likamligum persónum merkir í sær sjálvum, at kravið ikki verður galdandi fyri navnið/heitið á løgfrøðiligum persónum, tað veri seg fyritøkur, kommunur og aðrir almennir myndugleikar.

Um ein fyritøka eitur tað sama sum ein likamligur persónur (t.d. navnið á stjóra, eigara ella fyrrverandi eigara), kann navnið á fyritøkuni almannakunngerast, so leingi tað er fyritøkan, ið verður umrødd, og ikki persónurin við navninum. Hetta er eisini galdandi fyri einstaklingafyritøkur.

At einstaklingurin/persónurin *ikki skal verða nevndur við sínum navni* merkir, at navnið hjá viðkomandi ikki skal ganga fram av almannakunngjørdu avgerðini. Tað merkir ikki, at avgerðin skal verða gjørd ókennilig á annan hátt. Kravið um navnloysi forðar sostatt ikki fyri, at Dátueftirlitið almannakunnger eina avgerð, har "aðalstjórin í løgmálaráðnum" ella "stjórin fyri sjúkrahúsverkið" verður umrøddur, hóast nógv munnu vita, hvørjar persónar talan tá vil vera um.

At kravið um navnloysi fyri einstaklingar verður varðveitt – soleiðis sum tað er lýst omanfyri – er ein verja fyri einstaklingin, sum samstundis ikki avmarkar møguleikarnar hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera nakra avgerð.

Endamálið við broytingini av § 73, 2. pkt. er at tryggja, at tað verður møguligt hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera allar sínar avgerðir.

Hetta merkir tó ikki, at Dátueftirlitið fer at almannakunngera allar sínar avgerðir í framtíðini. Dátueftirlitið fer framvegis bara at almannakunngera avgerðir, sum Dátueftirlitið metir hava

prinsipiellan týdning fyri, hvussu dátuverndarlógin skal skiljast, ella sum hava stóran týdning í sær sjálvum.

Broytingin fer at gera tað munandi lættari hjá Dátueftirlitinum at greiða frá einum máli, hvat niðurstøðan í einum máli er grundað á, og harvið eisini hvussu løgtingslógin eigur at verða tulkað í ymiskum samanhangum.

Við broytingini verður Dátueftirlitið eisini javnsett við aðrar føroyskar eftirlitsmyndugleikar og stovnar sum t.d. Kappingareftirlitið, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann, sum allir hava møguleika at kunngera sínar avgerðir, uttan at tær skulu vera gjørdar navnleysar og ókenniligar áðrenn.

Dátueftirlitið verður eisini javnsett við dátueftirlitini í grannalondum okkara, sum flest øll hava henda møguleika, og sum Dátueftirlitið hevur eitt gott og tætt samstarv við.

Mett verður harafturat, at broytingin fer at hava við sær ein uppalandi og harvið eisini fyribyrgjandi virknað, tí eingin fyritøka ella stovnur hevur ynski um at enda á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, tí fyritøkan ella stovnurin ikki hevur hildið sínar skyldur sambært dátuverndarlógini. Møguleikin fyri at verða settur í ringt ljós fer sostatt at virka sum ein tileggjan til at halda løgtingslógina, og til at akta boð frá Dátueftirlitinum – serliga fyri almennar myndugleikar, sum ikki kunnu revsast fyri brot á dátuverndarlógina á sama hátt sum privat.

§ 36 í dátuverndarlógini avmarkar m.a. kunningarskylduna og rættin hjá tí skrásetta til innlit, tá ið tað ítøkiliga verður mett, at um upplýsingarnar koma í ljósmála, kann tað skaða t.d. landsins trygd og verju ella samskifti við útlendskar tjóðir. Sambært § 73, 3. pkt. í dátuverndarlógini skal ásetingin nýtast samsvarandi fyri almannakunngering. § 73, 3. pkt. kann tí eisini avmarka møguleikarnar hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera eina avgerðir, ella partar av eini avgerð, og hetta verður ikki broytt við uppskotinum.

**Til § 2**
§ 2 er vanlig gildiskomuáseting.

Ásetingin leggur upp til, at løgtingslógin skal koma í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Løgmálaráðið, dagfesting.

**Bjarni Kárason Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur

Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: